


# Nýggj fløga við gomlum upptøkum




**Tey av Kamarinum hava givið nýggja fløgu út. Men løgini eru vælkend. Talan er um gamlar innspælingar, sum eru nýmótansgjørdar**

Í vikuni kom nýggj fløga við teimum av Kamarinum á marknaðin.

Hetta er fløga við gomlum innspælingum, sum fyrr hava verið givnar út a LP og bandi. Upptøkurnar eru gjørdar í studio hjá Milson Zachariassen í 1982-1984.

Á fløguni eru 12 løg, sum øll eru vorðin meira og minni fólkaogn. Nevnast kunnu løg sum: Tá kvøldið kemur, Mær leingist og Seinasta vaktin, sum øll eru slík, fólk hava hoyrt á dansigólvi saman við Teimum av Kamarinum í fleiri ár. Fleri av sangunum eru eisini vanligir veitslusangir.

Í fororðinum nevnir Leivur Hansen, býráðsformaður í Havn Tey av Kamarinum fyri elsta og uttan iva ein tann mest elskaða dansibólkin í Føroyum. Og fleri munnu tey vera um miðan aldur, sum geva honum rætt.

Eitt lítið hefti við sangtekstum og frágreiðingum fylgir við. Á forsíðuni er sama myndin, sum var á LP plátuni og bandinum, sum givin vórðu út í 1984. Myndin sýnir tey, sum myndaðu bólkin í 1984. á baksíðuni er mynd av húsunum á Kamarinum. Inni í heftinum eru so myndir av somu fólkunum í dag. Og tað er rættilig áhugavert at samanbera.

Plátuhandilin hjá Hanseman Tórgarð gav út í 1984, og tað er sami plátuhandil, sum stendur fyri fløguútgávuni, sum nú er komin.

**ej**






# Ætlar at hjálpa teimum sum mistu hús og heim í kreppuni

**Eftir nýggjár fer Miðflokkurin at leggja uppskot fyri tingið um at hjálpa teimum, sum mistu húsini í kreppuárunum fyrst í nítiárunum**



*–Nógvir túsund føroyingar komu so illa fyri í kreppuárunumm, at teir máttu rýma frá húsi og heimi. Teir eiganú at fáa hjálp, so at teir sleppa undan skuldini so at tey fáa sítt fíggjarliga frælsi aftur, sigur Jenis av Rana, løgtingsmaður. Eftir nýggjár fer hann at leggja uppskot fyri tingið un hetta*

KREPPUHJÁLP
*Áki Bertholdsen*

Nú skulu tey, sum komu í fíggjarligt óføri í kreppuárunum fyrst í nítiárunum, hava fíggjarliga hjálp, fyri at sleppa undan skuldini.

Tað heldur í hvussu so er Miðflokkurin.

Jenis av Rana, sum er løgtingsmaður fyri Miðflokkin, fer stutt eftir nýggjár at leggja uppskot fyri tingið um at hjálpa teimum, sum komu illa fyri í kreppuni.

–Tað verið nógv tað léttasta at gjørt eitt uppskot um at áleggja landsstýrinum at gera ein slíka lóg.

– Men vit hava alt ov nógv dømi um, at slík uppskot, koma ikki longur enn í eina skuffu í Tinganesi og har verða tey so súltað og koma ongantíð longri.

Løgtingsmaðurin sigur, at tí ætlar hann at smíða eitt fullfíggjað lógaruppskot, sum so verður lagt fyri tingið.

Hann sigur, at uppskotið er ikki endaliga orðað, men sjálv beinagrindin er formað.

– Uppskotið kemur helst at miða ímóti, at tey skulu fáa hjálp, sum hava eina negativa eginogn á ognaruppgerðini, og at hendan negativa eginogn kann sigast at vera ein avleiðing av húsagangi undir kreppuni.

– Tað vil siga, at tey, skulu fáa hjálp, sum vórðu harðast rakt av, at virðini á sethúsum vórðu skrivað niður í helvt eftir einari nátt.

– Hetta vóru fólk, sum ikki megnaðu at sita í húsunum, men mátti lata bankanum lyklarnar. Tey komu sostatt at vera fyri teirri vanlagnu, at tey bygdu hús fyri dagsprís undan kreppuni, men at húsini so vórðu seld aftur á tvingsilssølu fyri dagsprís undir kreppuni.

Jenis av Rana sigur, at hesi fólkini komu í allarflestu førum at sita eftir við eini skuld til bankarnar uppá nakrar hundrað túsund krónur.

– Men Bankin heldur framvegis fast við kravið, ella partar av tí.

– Sostatt noyðast summi av hesum fólkum at leiga fyri opkursprís, meðan tey harafturat noyðast stríðast við eina gamla skuld, sum onki virði er aftanfyri.

– Onnur royna at flýggja undan skuldini á ymsan hátt, men tey vita, at neyvan nakrantíð verða skuldarfrí. Uppaftur onnur rýmdu av landinum og hava fingið eina rímiliga tilveru uttanlands. Men tey vita, at tey kunnu ikki koma heimaftur, tí her stendur pantifútin og tekur ímóti teimum.

Jenis av Rana sigur, at talan er eisini um at hjálpa teimum, sum máttu frysta skuldina niður, men sum verða fíggjarliga sperd, nú lánini skulu tiðnast upp aftur.

# Sótu eftir við eini skuld uppá hálva millión

**Eini hjún betaltu 11.000 krónur um mánaðin í níggju ár, men stóðu eftir við stórari skuld tá ið avtornaði. Hevur bankin onga skyldu mótvegis hesum fólkum, spyr Jenis av Rana**

KREPPUHJÁLP
*Áki Bertholdsen*

– Uppá níggju ár, betaltu tey eina heila millión í rentum og avdráttum. Men kortini komu tey at standa eftir við eini skuld uppá eina hálva millión.

Hetta er støðan hjá einum húskum í Havn.

Sum tað sæst aðrastaðni í blaðnu, fer Jenis av Rana, løgtingsmaður, nú at leggja uppskot fyri tingið um at hjálpa teimum, sum komu illa fyri í kreppuárunum

Í hesum sambandi greiðir hann frá einum ítøkiligum dømi um, hvussu illa eitt húski kundi koma fyri í kreppuárini.

Hetta veruliga dømi, er um eini hjún, sum bygdu hús miðskeiðis í áttatiárunum.

– Tey skyldaðu umleið eina millión í húsunum. Og hvønn mánaða í níggju ár gjalda tey umleið 11.000 krónur um mánaðin. Hesi níggju árini hava tey sostatt goldið eina heila millión í rentum og avdráttum. Men hóast tey hava goldið so nógv, minkaði skuldin bara góðar 100.000 krónur øll hesi árini.

– Í 1993 missa bæði maður og kona arbeiðið og avleiðingin er, at tey eru ikki før fyri at gjalda rentur og avdrátt í næstan eitt ár.

– Rentan av hesum er so mikið høg, at bara hetta eina árið, missa tey so at siga alt, sum tey hava goldið øll hini níggju árini. Avleiðingin er, at bankin setur krav fram um at fáa gjaldið, ella lyklarnar til húsini...

Jenis av Rana sigur, at hesin sami bankin hevur fingið einar tríggjar milliardir frá Føroya fólki og frá danska landskassanum. Hetta var peningur, sum bankin júst fekk til at seta av ímóti slíkum tapum.

– Men, hvat ger bankin í hesum førum? Hann selir húsini fyri 500.000 krónur.

– Sostatt komu hesi hjúnini at standa eftir við eini skuld uppá hálva millión, sum tey verða noydd at gjalda av, hvønn einasta mánaða.

Jenis av Rana spyr, um bankin ongar skyldur hevur mótvegis fólkum sum hesum.

Hann sigur, at Miðflokkurin hevur ikki endaliga orðað uppskotið um, hvussu hesi fólkini, skulu hjálpast - um tað skal verða banlin, sum avskrivar skuld, ella um tað skal verða landskassin, sum hjálpir beinleiðis.

Men hann heldur, at tað kann koma út uppá eitt, tí landskassin, og sostatt Føroya fólk, eigur bankan. So tað kann gera tað sama, hvussu hjálpin verður latin.

